# Heilsu- og innlendismálaráðið

## FÁ HJÁLP TIL AT …

Klaga um viðgerð ella tænastustøðið

Søkja um endurgjald fyri skaða í sambandi við viðgerð





Sum sjúklingur og eftirsitandi hjá sjúklingi hevur tú møguleika fyri at klaga um viðgerð, tú hevur fingið í føroyska heilsuverkinum og kæra um avgerðir, sum heilsuverkið hevur tikið.

Um tú hevur fingið ein skaða í sambandi við kanning ella viðgerð í heilsuverkinum ella av læknafyriskrivaðum heilivági, hevur tú møguliga rætt til endurgjald.

Set teg í samband við viðkomandi heilsustarvsfólk, t.d. kommunulækna, sjúkrarøktarfrøðing og fysioterapeut, ella Heilsu- og innlendismálaráðið á tlf. 304050 ella umvegis teldupost himr@himr.fo og fá vegleiðing um tíni rættindi og møguleikar, hjálp til at útfylla kæru- og fráboðanarskjal og ráðgeving í hesum sambandi.

## Um tú vilt klaga um viðgerð í heilsuverkinum

Styrelsen for Patientsikkerhed viðger klagur um heilsufakligt virksemi, t.d. kanning, sjúkugreining, skurðviðgerð, medisinska viðgerð, endurvenjing og røkt.

Klagast skal innan 2 ár eftir, at tú fyrstu ferð fekk illgruna um, ella átti at havt fingið illgruna um, at viðgerðin var ónøktandi og í seinasta lagi 5 ár eftir, at viðgerðin fór fram.

Styrelsen for Patientsikkerhed viðger eisini kærur um innlit í sjúklingajournalir.

Les meira á heimasíðuni hjá Styrelsen for Patientsikkerhed
**www.stps.dk**

## Um tú vilt kæra um avgerðir tiknar í heilsuverkinum

Føroya Kærustovnur viðger kærur um fyrisitingarligar avgerðir, t.d. avgerðir um ferðaendurgjald innanoyggja, ferðaútreiðslur og uppihald í sambandi við viðgerð uttanlands og gjald fyri ferðing og uppihald hjá fylgjarum.
*Kærufreistin er 4 vikur.*

Les meira á heimasíðuni hjá Føroya Kærustovni
**www.kaerustovnur.fo**

## Um tú vilt kæra um tvingsil í sambandi við psykiatriska viðgerð

Serligar reglur eru galdandi fyri kærur í sambandi við tvingsil í psykiatriini. Kærast kann til Føroya Kærustovn um t.d. tvingsilsinnlegging, tvingsilsviðgerð og brúk av tvingsilsfastspenning.

Tú kanst fáa fleiri upplýsingar á heimasíðuni hjá Føroya Kærustovni **www.kaerustovnur.fo** leita eftir **„Psykiatriska Sjúklingakærunevndin“**.



## Um tú vilt klaga um tænastustøðið
Ynskir tú at klaga um vanliga tænastustøðið í heilsuverkinum, t.d. starvsfólkaatburð, hølisumstøður, mat og reingerð, skalt tú venda tær til viðkomandi sjúkrahús ella viðgerðar-/kanningarstovn.

## Um tú ynskir at søkja um endurgjald fyri ein skaða
Sum sjúklingur og avvarðandi hevur tú møguliga rætt til endurgjald fyri ein skaða, sum er íkomin í sambandi við kanning ella viðgerð í heilsuverkinum. Ynskir tú at søkja um endurgjald, skalt tú fráboða skaðan til almennu donsku sjúklingatryggingina – Patienterstatningen.

Patienterstatningen veitir endurgjald fyri skaðar og deyðsfall, ið eru elvd av skeivari ella seinkaðari sjúkugreining ella vantandi viðgerð. Patienterstatningen veitir eisini endurgjald fyri skaðar, elvdir av læknafyriskrivaðum heilivági.

Patienterstatningen veitir bara endurgjald fyri fíggjarligt tap og veitir samsýning fyri sviða og sárka og / ella varandi mein.

Viðgerðar- og heilivágsskaðar skulu fráboðast til Patienterstatningen í seinasta lagi 3 ár eftir, at tú varnaðist, ella átti at havt varnast skaðan. Skaðar, ið ikki eru fráboðaðir í seinasta lagi 10 ár eftir, at skaðin er hendur, eru tó endaliga fyrnaðir, og tá verður endurgjald ikki veitt.

Les meira á heimasíðuni hjá Patienterstatningen
**www.patienterstatningen.dk**



Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • himr@himr.fo • www.himr.fo